Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Magnus Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Góðsking og víðarivirking av laksi

Spurningar:

1. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at loysa avbjóðingarnar við, at arbeiðspláss eru í vanda fyri at detta niðurfyri í alivinnuni?
2. Nær kann roknast við, at hesar loysnir verða settar í verk?

Viðmerkingar:

Tá tað munandi hækkaða tøkugjaldið var til viðgerðar í Løgtinginum í vár varð víst á stóru avbjóðingina viðvíkjandi framleiðslu av liðugvøru úr laksi, sum økta tøkugjaldið fór at hava á hendan partin av alivinnuni. M.a. varð víst á, at stórur vandi var fyri arbeiðsplássunum á góðskingarvirkinum á Glyvrum og hvørjar avleiðingarnar kundu verða fyri starvsfólkið, økið har á leið, og so sanniliga eisini á føroyska samfelagið.

Á heimasíðuni hjá KVF stendur 18. september 2023 m.a. at lesa, at nýggju tøkugjøldini taka grundarlagið undan virkseminum hjá Bakkafrosti á Glyvrum og at ivasamt er, um tey 300-400 fólkini á virkinum hava nakað arbeiði eftir 1. januar. Orsøkin er, at virkið á Glyvrum ikki longur er kappingarført orsakað av nýggju tøkugjøldunum.

Hetta eru ófrættakend tíðindi.

Men tað hevur ligið á ljóði, at landsstýrismaðurin arbeiðir við loysnum á hesum avbjóðingum, og tað er í tí sambandi, at hesin fyrispurningur verður settur.

Á Løgtingi, 19. september 2023

Magnus Rasmussen